

*Svalbard er eitt land í ger og her sæst ein tindur verða evnaður til av tveimum jøklum*

Undir Norðpólinum:

# Svalbard eitt land í gerð

**Brot úr arbeiðsdagbókini á eini ferð til Svarbard í juni mána í ár. Frásøgnin verður prentað í trimum pørtum. Triði partur kemur í seint í august**

DAGBÓKABROT FRÁ EINI SVALBARDSFERÐ
*Jústinus Leivsson*

**Týsdagur 18. juni 2002**

Vit loysa úr Longyear býnum, eitt navn sum onki hevur at gera við nakað langt ár, men er uppkallaður eftir fyrsta námsstjóranum her á staðnum. Mr. Longyear ið var amerikanari.

Tað fór at rulla beinanvegin, og hóast eg vanliga eri sterkur á sjónum, so fekk eg sjóverk. Best var at halda seg á dekkinum. Har gjørdist tó skjótt ov kalt og so niður undir aftur at lata meg í einar vindtættar buksur, brølapu, oman á henni húgvu og síðan hetta. Dubbaður í føroyskum vøttum, og eini fýra løgum frá innasti til uttast, fór eg aftur á dekkið og nú bar til. Nú munti kuldin ikki, og eg nýtti stórslignu náttúruna út eftir Ísfjørðinum. Vit sigldu fram við gomlum námsbýum og sóu hesa stórbæru og naknu nátúru. Eg kom at hugsa um Føroyar, soleiðis hava tær sæð út, tá seinasta ístíð fór at hæsa av fyri góðum 10.000 árum síðan. Svalbard er enn ikki liðugt, men verður brýnt og evnað til av ísi og veðri. Onki land er liðug, tí ein støðug niðurbróting ferð fram, í jarðfrøðini er eisini javnvág.

Vit løgdu at í Barentsburg. Ein russiskur kolanámsbýur uttalaga á syðra armi á Ísfjørðinina inni á einum lítlum fjørði. Ein ung russisk dama tók í móti. Hon tosaði enskt og skuldi vera okkara ferðaleiðari. Hon forklárari longu á bryggjuni, at sovjetiski staturin hevði keypt hendan staðin frá einum hálendskum firma í 1932, og síðan tá hevði staturin átt minubýin. Áðrenn høvdu russar verið her, men undir fyrra kríggj yvirtóku hálendingar minuna. Nú er Sovjetsamveldið burtur og Rusland eigur býin. Fólkatalið hevði svingað nakað. Onkuntíð høvdu verið yvir 2000 manns. Nú vóru umkring 700 og 300 kvinnur.

So langt burturi, so langt frá bygdum øki, so langt frá sivilisatiónini sum í Barentsburg finnir tú eitt vakstrarhús. Jú eg lúgvi ikki, og hetta vakstrarhús passar ein klænvaksin maður úr Ukraine. Hann er nøkur og fjøruti ár, sær eldri út, svartar tenn og er blídligur. Inni í vakstrarhúsinum er vøksturin heldur bleikari enn vit kenna hann suðuri hjá okkum og longur suðuri. Eg spurdi meg sjálvan. Hvussu ber tað til, at russar hava vakstrarhús her. Jú teir dyrka grønmeti til egið brúk. Ukrainemaðurin vísir errin tomatplanturnar. Tær hómast smáar grønar á plantunum. Um ikki so langa tíð, so fara tær at lita døgurðan her í Barentsburg og uttan iva verða tær eisini at síggja í onkrari tomat. Og meðan vit ganga frá vakstrarhúsinum, síggi eg eina agurkuplantu í einum vindeyga í eini íbúð, sum vendir móti suðri.

Vit eru á veg inn í svínastallin.Føroyingar kenna einki til svínahald, og eg var heilt ófyrireikaður. Fy for den lede, sum ein føroyingur eg arbeiddi saman við í sjómannskirkjuni plagdi at taka til. Ongantíð fyrr





*Jú vakstarhús er hjá russum á Svalbard*

havi eg kent so ringan royk. Tað setti at hjartanum og eg mátti skunda mær út aftur. Danskir tíðindamenn, sum vóru við á ferðini, og sum høvdu verið í svínaleiki fyrr, vóru heilt órørdir av situatiónini og bedýraðu, at hetta var einki verri enn í einum donskum svínastalli. Har luktaði heilt svínagtugt.

Uttanfyri gongur ein lítil fittur hundur. Tað er ein tík sum eitur Nadia. Hon er blíð, og øll eru góð við hana, eisini russar, sum hon hittir, meðan hon eltir okkum.

Og so eru vit inni í fjósinum, har heilt vanlig neyt halda til. Og luktaði illa í svínastallinum, so var meira heimligt millum góðsligu jótrandi neytini við erna tarvinum fremst og einum skinklandi nýkálvaðum kálvi aftast. Ongan tíð fyrr havi eg verið í so reinum fjósi. Ikki eitt smusk sást á neytunum, sum lógu turr og fjálg og vælrøkt á saðuspønum. Neytini geva mjólk og fekst kjøt, sum kemur væl við, her kolaniða er fýra mánaðir um árið. Eini 20 neyt vóru í fjósinum.

Vit ganga heim í býin. Her er alt russiskt, skitið og ósjarmerandi. Tristur litur og nógv í forfalli. Uppi í eini brekku stendur Lenin gamli stirdur í bronsu, hesin gamli mordarin, proletar-zarurin, sum lumpaði heimin so dyggiliga. Tað eru restirnar av hansara veldi vit síggja í Barentsburg. Men hann er søga og tí eigur hann at varðveitast, sigur ferðaleiðarin eins og at bera í bøtuflaka fyri honum.

Tað er so øtililga kalt at ganga her, hóast sólin skínur. Landnyrðingurin er ikki at spæla við so norðalaga, Hann kemur so beint norðan úr Íshavinum av sjálvum pólinum og hann kemur frá einum lágtrýsti, sum hevur volt ódn her á leiðum í eina heila viku. Eitt lágtrýst, sum slett ikki eigur at vera her, tí hesa tíðina í juni er vanliga hátrýst við góðum veðri yvir Svalbard.

Vit nærkast bygninginum, har námsarbeiðararnir fara niður í námið. Har standa nakrir á trappuni. Teir skulu arbeiða niðri í jørðini næstu seks tímarnar. Teir vinna væl meira av peningi enn felaganir heima í Ukraine. Teir hava bundið seg til eina tvey ára kontrakt og næsta vaktin styttir kontraktina nakrar tímar. Munnu teir koma út aftur. Í 1998 hendi ein hervilig vanlukka í tí eina náminum. Ein dygg gasspreinging og nógvir lógu eftir á. Tann minan er nú stongd. Tað er nógv gass í kolinum á Svalbard og minurnar hava kravt nógv mannalív.

Og so koma vit endiliga stird inn í eina matstovu, eina barr við vodka og øllum góðum. Og teir skeinkja upp í vatngløs og hitin rennir úr í kroppin, hjá teimum sum leggja á. Skjótt fara fólk at práta, og tá vit skulu fara av stað aftur, er tað onkur sum hevur hug at sita eftir.

Og so keypa vit inn. Eg standi fyri triðju ferð í lívinum við eini russiskari skinnhúgvu í hondini. 250 krónur kostar hon. Hinar báðar eru báðar ov lítlar, men góðir sølumenn hava verið. Aðra keypti eg í Moskva fyri 12 árum síðan á veg til Kuba. Tá mundi vitið verða minni enn skilið. Í spølni gekk eg við henni einaferð á Kuba og ísmaðurin á leguni, har vit hildu til, gjørdist so skakkur, tá hann sá meg, at hann bliknaði. Og tað er ikki hvørsmannsføri, tá tú er bikasvartur longu í móðurlívi. Hina keypti eg í Singapore frá einum arabiskum handilsmanni kallaður Farouk. Hann mundi verða ein góður seljari, tí honum eydnaðist at sleppa av við fleiri skinnhúgvur í tropiska hitanum. Eg var ikki tann einasti sum keypti, men mín tódnaði og er trong um skallan í dag. Tú kann ikki stóla upp á kaninskinn. Eg mundi keypt eina húgvu afturat, men so knappliga fór eg at hugsa eitt sindur fornuftugt. Hvat í allari víðu verð skal eg við eini skinnhúgvu í Føroyum. Har er ongantíð so kalt, at tað rættvísger at ganga við skinnhúgvu. Skinnhúgvur gera ikki nyttu fyrr tað er minus nógv stig, og okkara regn fær ein í skinnhúgvu at líkjast einum hálvnýsloktum kálvi. Eg legði húgvuna nøgdur aftur á hyllina.

Uttanfyri var nógv órudd og gomul hús, sum ikki verða nýtt longur. Standa bara og forfalla. Børn eru í Barentsburg. Vit síggja tey ikki, men vit eru heldur ikki allastaðni og ferðaleiðarin greiðir okkum frá, at ein nýføðingur er í bygdini, ein valskapt genta sum eitur Victoria.

Á Svalbard er reint vatn ein trupulleiki, tað er ikki so lætt at finna vatn, tá so nógv frost er. Russar hava funnið vatn hinumegin fjørðin og eina vatnleidningur liggur niðri í fjørðuni heilt inn á botn í Grønafjørðinum og út aftur til Barentsburg. Fýra manns við familju eru hinumegin fjørðin og ansa eftir vatnleiðingini og tey koma sjálvdan til Barentsburg. Teir liva einsamøll avbyrgd við einum fjøri á breidd við Skálafjørðin í millum sín.

Fólk koma av og á at vitja í Barentsburg. Fyri tað mesta eru tað norðmenn úr Longyearbýnum, sum liggur longur inni í Ísfjørðínum, sum Grønifjørður, har Barentsburg liggur, er ein síðufjørður til. Norðmenn vitja á kavaskutara um veturin. Sýslumaðurin vitjar einaferð um vikuna alt árið. Hann hevur egið hús nakað innanfyri bygdina Baretnshús. Hann kemur við egnari tyrlu og koyrir við egnum bili við sjafføri, tá hann skal vitja russiska konsulin. Teir hava nógv at tosa um. Sýslumaðurin skal eisini halda eyguni eftir, at russar halda umhvørvisforskriftirnar og tá hevur tað ikki so nógv at siga, at óruddiligt er. Størri týdning hevur tað hvat verður latið út á sjógv av eiturevnum frá náminum.

**Mikudagur 19. juni 2002**

Stolta svenska skútan Orige er komin út í rull, vit halda leiðina norðureftir móti Ny Aalensund, sum liggur eini 80 fjórðingar longur norðuri. Vit skulu sigla innanskers millum longu oynna Forland og meginlandið. Hetta er eitt sindur av luksusi, sum annars vit sita og droyma heima um vetrarnar. Eitt lítið skip, har vit búgva í tveymannslugarum, og fáa alla servering frá manningini umborð. Vit ótu døgruða, áðrenn vit løgdu frá landi úr Baretnsburg. Benløse fugle og forrætt. Sera leskiligt, serverað av grýtulappanum, einum norðursvenskum kokki, sum forkelar okkum umborð. Kathútsjomfrúin serverarar. Eg havi fortalt henni mína hemmiligheit við sukursjúkuni og hon fær umsorgan í eyguni, hon eltir meg við millumbreyði á allari ferðini. Kaffi og konjakk er at fáa allan dagin. Eitt klaver er niðri undir, og tá ein finnskur tíðindamaður hevur fingið konjakið niður um, so setir hann seg at klimpra tann villasta jassin.

Men rullið køvdi jassin og her gjørdist eitt sindur manntómt. Eg tørnaði inn, men kahúttsfelagin hjá mær gjørdi enda á náttini við at koma dýrandi fullur inn um trýtíðina. Hann var ikki vanur við skipslív stakkalin. Fór á vesið uttan fyri gloymdi at lata hurðina aftur og hon bankaði nakra ferðir heilt tamarhaldsleyst, og eg var vakin, sum ein lúrandi køttur, beint áðrenn hann loypir á. Eg bannaði finnan niður í sand og øsku, men fyrigav honum løtu seinni, hatur og andvekur hóska illa saman. Og fittur er hann eisini.

Nú gjørdist fjørðurin víðari og vit høvdu hann beint ímóti. Eg spenti meg fastan í koyggjuni, men hvíld gjørdist lítil. Eg vaknaði aftur, tá vit lógu vit bryggu í Ny-Aalesund.

Áh sum her er vakurt. Ny Aalesund liggur á syðra armi á Kongsfjørðinum. Her eru jøklar at siggja allastaðni, stórir jøklar sum ganga beint í hav. Okkurt minni ísfjall er eisini at síggja. Inni á botni inni í landinum standa tríggir vakrir tindar, Tre Kroner verða teir nevndir. Teir eru vartekin yvir hendan býin og kolanámsmenn hava kent seg heima, tá teir hava sæð hesar tindar.

Ny Aalesund er ein fyrrverandi námsbýur, grundlagdur í 1917 av einum norðmanni sum var ættaður Brandal – tætt við Aalesund. Síðan 1963 hevur einki kolavirksemi verið í býnum. Tað endaði syrgiliga við eini gassspreinging inni í náminum. 21 mans lógu eftir á og bert 10 av teimum fingu kristna jørð. Hinir eru enn í náminum. Hetta var endin á eini daprari søgu. Síðan kríggið høvdu 75 manns latið lív í náminum. Tað skuldi júst lata aftur. Teir høvdu gjørt klárt til eitt nýtt. Trygdin var ikki í lagi og vanlukkan endaði við eini politiskari gølu í Noregi, sum endaði við at javnaðarstjórnin, sum hevði sitið við valdið í mong ár mátti fara frá.